## KÍ styrkir kvinnuliðið

KÍ-kvinnurnar hava í ár fingið harða mótstøðu frá B36 í oddastríðnum í bestu kvinnudeildini. Har eru tó enn nógvir dystir eftir at spæla, og til hesar hevur felagið eisini styrkt seg við tveimum av bestu føroysku spælarunum. Kristina Eyðbjørnsdóttir hevur áður spælt við KÍ, og eftir summarsteðgin verður hon aftur at síggja í felagnum. Tað sama verður Olga Kristina Hansen, sum áður hevur spælt við AB. Hon hevur seinasta árið verið á ítróttaskúla í Oure í Danmark, men sambært spælarayvirlitinum hjá FSF fer hon nú at spæla við KÍ.



## Silvur til menninar

Isle of Man var stig framman fyri Føroyar, tá liðkappingin hjá monnum var á skránni fyrrapartin í gjár. Isle of Man er júst ein av oyggjaleikatjóðunum, sum hevur gjørt stór framstig innan fimleikin seinnu árini. Og tað eydnaðist eisini hjá teimum at vinna liðkappingina í dysti við Føroyar. Men silvurið hjá okkara monnum er tó eisini væl og virðiliga góðtikið.

# B36 vil hava hat-trick

**Talan er um sterka mótstøðu, men í B36 trúgva spælararnir uppá, at teir triða árið á rað kunnu spæla seg til næsta altjóða umfarið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við samanløgdum sigrum á íslendska ÍBV og maltesiska Birkirkara hevur B36 tey bæði seinnu árini skrivað nýggjar kapitlar í føroyskari fótbóltssøgu.

Og málið er at skriva enn ein kapittul, nú teir í kvøld spæla heimadyst móti litaviska Ekranas í UEFA-cup kappingini.

Vit vita ikki so nógv um teirra lið. Men teir hava fleiri landsliðsspælarar, so talan er uttan iva um eitt lið, sum er ført fyri at spæla góðan fótbólt, sigur Klæmint Matras hjá B36.

Men hóast trupult, so heldur Klæmint ikki, at talan er um ógjørligan setning.

Vit vilja sjálvandi royna at koma víðari aftur í ár. Vit hava eitt ilð, har nógvir royndir spælarar eru við, og tí halda vit okkum vera væl fyri. Og tað hevur sjálvandi eisini givið sjálvsálit, at vit tey bæði seinnu árini hava spælt okkum víðari, sigur hann.

Til dystin hevur B36 at kalla allar mans tøkar. Einasta undantakið er Jóhan V. Gunnarsson, sum hevur fingið ein stoyt í knæið, og sum tí er ivasamur.



*Fysiskt hevur B36 seinnu árini verið eitt fet framman fyri hini liðini í Føroyum. Nakað sum ikki minst er komið liðnum til góðar í aljóða uppgávunum. Sum her, tá Klæmint Matras í fjør legði B36 á odda móti Birkirkara*

## Fyrsta royndin hjá EB/S

**EB/Streymur skal fyri fyrstu ferð royna seg í altjóða dysti, tá teir í kvøld spæla á útivølli móti finska MyPa**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein stórur trupulleiki hjá EB/Streymi, nú teir fyri fyrstu ferð royna seg í altjóða høpi, er, at teir snøgt sagt einki vita um mótstøðuna. Tá vit í morgun høvdu samband við leguna, høvdu teir til fánýtis roynt at fingið fatur á sjónbandi av onkrum dysti hjá finnlendingunum. Og at spyrja um, nær mótstøðuliðið venur, tóktist nytta lítið, skilst.

Men tað er tó lítið at ivast í, at talan er um sterka mótstøðu. Finska liðið hevur seinnu árini verið millum tey fremstu í landinum, og við skjótum fótbólti og sterkum einstaklingum verða teir uttan iva ein stórur biti hjá føroyska liðnum.

Og fortreytirnar hjá EB/Streymi eru so heldur ikki heilt optimalar. Tað er greitt, at Rafal Kwiecinski ikki verður við í hópinum í kvøld. Hann hevur ein vøddaskaða í lærinum, og tað sama hevur Leif Niclasen, sum tí heldur ikki fær spælt.

Dysturin hjá EBS/treymi byrjar klokkan 17 føroyska tíð.


Útbering av dagbløðum og reklamum



LEYST STARV
Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í
Klaksvík
Ert tú 13 ár, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost:
**utbering@prent.fo**

Prentmiðstøðin
Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo


FH-HB 1-4 (1-2):

# Mistu í trýstinum

**Tíðliga í fyrra og tíðliga í seinna hálvleiki skoraði íslensdka FH fýra ferðir, og so gjørdist mótbrekkan ov tung hjá HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Tað gekk ikki hjá HB at skapa sær eitt fordeilaktugt útgangsstøði undan seinna dystinum móti íslendsku meistarunum úr FH. Í útidystinum í gjárkvøldið kom HB alt fyri eitt undir stórt trýst, og eftir 12 minuttum stóð 2-0 á talvuni. Fyrra málið skeyt vinstri bakkurin hjá FH, tá hann fangaði returbólt eftir skot á stongina, og tveir minuttir seinni økti Matthías Vilhjámsson, eftir at Tróndur Vatnhamar í fyrstu atløgu hálvbjargaði góðum stútara.

Skjóta leiðslan setti ferðina á íslendska spælinum nakað niður, og tað eydnaðist eisini HB at spæla seg longur fram eftir vøllinum. Og beint fyri hálvleik minkaðu teir um munin, tá Tommy Nielsen hjá FH beindi hornaspark í egið net.

Tað gingu tó ikki meira enn 12 minuttir av seinna hálvleiki. So hevði FH aftur skotið tvey mál. Sigurvin Ólafsson stútaði bóltin í netið til 3-1, og við góðum skoti kundi Matthías skjóta sítt næsta mál og fjórða málið hjá FH.

Úrslitið ber við sær, at HB neyvan skal gera sær tær heilt stóru vónirnar um at spæla seg víðari, tá teir eiga heimavøll á Tórsvølli. Íslendsku meistararnir vístu seg í so máta júst somikið sterkir, sum ótti var fyri, og enn restar nakað, áðrenn bestu føroysku liðini kunnu spæla við slíkari ferð, sum trífaldu íslendsku meistararnir gera tað.